# NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

Karl Eli Sigvardsen, Tórshavn:

## 25 ára starvsdag í Føroya Banka



Í dag, hósdagin 3. mars, hevur Karl Eli Sigvardsen arbeitt í Føroya Banka í 25 ár.

Karl Eli fór í læru í Føroya Banka í Havn 3. mars 1980, samstundis tók hann HMX-skeið á Føroya Handilsskúla í tvey ár. Skúlagongdin í Kommunuskúlanum. Hann varð útlærdur í 1983.

Hann tók eisini bankaskúla í fýra ár, og sum 26 ára gamal, í 1988, varð hann útnevndur til fulltrúa og avgreiðsluleiðara. Hann hevur havt nógvar ymiskar uppgávur gjøgnum árini - tó mest innan útlánsvirksemi bankans.

Í dag arbeiðir hann sum leiðari fyri Kredittdeild bankans.

Karl Eli hevur eisini tikið prógv á Finansakademiet sum fíggjarakademikari hjá Finanssektorens Uddannelsescenter í Skanderborg í 2001. Útbúgvingin var yvir 3 ár og varð skipað bæði sum beinleiðis skúli í Skanderborg og sum fjarlestur. Saman við einum starvsfelaga, Niels A. Joensen, vóru teir fyrstu føroyingar sum tóku hesa útbúgving.

Karl Eli er føddur í Sandavági í 1962, sonur Jacobinu, f. Petersen, úr Sandavági, og Petur Jacob Sigvardsen frá Gjógv. Systkini hjá Karl Eli eru Estrid Paula Sigvardsen, bókavørður, og Fróði Sigvardsen, handilsmaður, sum bæði búgva í Havn.

Familjan flutti til Havnar í 1976, har Karl Eli gekk í real í Eysturskúlanum.

Karl Eli er abbasonur Karl Jakku Sigvardsen við Gjógv, sum fylti 100 ár seinasta sunnudag.

Eftir realskúlan arbeiddi Karl Eli á Bacalao í einar 9 mánaðir, tá hann varð uppringdur av bankanum, um hann hevði hug at koma í læru. Hann tók av og byrjaði sum sagt 3. mars 1980.

Annars er Karl Eli áhugaður í at fara á flot, fiska síl og ganga á fjall.

Vanliga gongur hann á fjalli í Oknadali í Sandavági og í Sáttarenni í Funningsfirði. Eisini hevur hann góðan hug at ferðast í Føroyum og ikki minni úti í heimi.

Karl Eli er giftur við Óluvu, f. Midjord, úr Havn, ið eisini starvast í bankanum, børnini eru: Beinta 22 ár, Tummas 12 ár, Petur 10 ár og Birni 5 ár.

Fyri 30 árum síðan:

## VÍF næstan einaráðandi í 1975

**Í 1975 var VÍF næstan einaráðandi í landskappingini í hondbólti. Teir vunnu meistaraheitið í fýra av seks deildum: 1. deild, 2. deild, unglingadeildini og pinkudreingjadeildini**




*1. deild menn hjá VÍF í 1975, aftara rað f.v: Petur Pauli Poulsen, Kári Mortensen, Kári Durhuus, Ólavur Højgaard, Johnny Joensen, og venjarin Petur Sigurd Rasmussen. Fremra rað f.v: Palli Joensen, Heðin Winther Olsen, Gunnar Streymoy, Dánjal J. Andreasen, og Kristin Johansen*

*Kelda: Myndaárbókin – árið ið fór 1975*